

# Samkomublaðið fyri febr./mars 2018




KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar





www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið



## **Framtíð og vón**

Annika Frederiksberg

Tað verður ofta sagt, at tíðin aftan á jól kann vera tung og myrk at koma ígjøgnum. Tað kann kennast, sum at jólini og tann hugnaliga tíðin gekk alt ov skjótt, nýtt ár er byrjað, og kalendarin fyllist við nýggjum uppgávum.

At fara inn í eitt nýtt ár, kann fáa góðar og minni góðar kenslur fram í okkum. Nøkur hava kanska upplivað tað besta árið nakrantíð og síggja fram til eitt uppaftur betri ár. Onnur hava havt eitt stríð fyri og annað eftir, ímeðan onkur hevur upplivað sorgina at missa ella brotin forhold, og kenna seg einsamallan og gloymdan.

Eitt nýtt ár kann geva vón um, at umstøður broytast og blíva betur, at vit reisa okkum aftur og byrja av nýggjum. Gud er við okkum, hann hevur kraftina at bera okkum ígjøgnum alt. Menniskju rundan um okkum broytast, men Gud broytist ongantíð, hann er altíð hin sami og hevur givið okkum lyftir um at vera við okkum allar dagar, líka til enda tíðarinnar. ”Hann eitur Undurfullur, Ráðgevari, Veldigur Gud, Ævigur Faðir, Friðarhøvdingi.”

Lat okkum seta fokus á Gud, fyllast við Hansara gleði og friði. Líkamikið um tað eru góðir ella verri dagar, so kunnu vit minna okkum sjálv á, hvør Gud er, og hvørji lyfti vit eiga í Hansara orði. Gud ynskir at vera ein partur av øllum okkara viðurskiftum í lívinum, Hansara eygu eru yvir okkum, Hann hoyrir okkara bønir. Hann gevur einglum sínum boð um at varðveita okkum á øllum okkara leiðum. Í hesi tíð har tað kann kennast sum eitt stríð ímillum at brúka tíð saman við Gudi ella á sosialu miðlunum, er tað neyðugt, at vit veruliga velja at seta Gud fyrst í okkara lívi, at vit hugsa um, hvat vit raðfesta okkara tíð til. Tá vilja vit uppliva, at okkara hjarta fyllist við takksemi, gleði, friði og kærleika.

”Á Kristus bert mín vón er bygd, styrki og songur mín Hann er. Mín klettur, har eg hvíli trygt, ýla enn stormar, Hann meg ber. Hvør kærleiki, hvør friður her, tá stríð er av, og óttin fer. Mín troystari og sterka borg. Kristus meg elskar, Hann meg ber”.

Jeramias 29:11; ”Tí Eg veit, hvat Eg ætli og havi í huga viðvíkjandi tykkum – sigur Harrin – friðarætlanir og ikki vanlukkuætlanir, at geva tykkum framtíð og vón”.

# Skrá fyri febr./mars

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 19. febr. | kl. 17.00: | Bønardagur |
| Týsdagur | 20. febr. | kl. 10.00: | Bønarmøti |
| Hósdagur | 22. februar | kl. 10.30-13.00: | Mammucafé |
| Leygardagur | 24. febr. | kl. 20.00: | AWAKE við Anne Hove Sunnarvik (NO) |
| Sunnudagur | 25. febr. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Anne Hove Sunnarvik (NO) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 26. febr. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 27. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Fríggjadagur | 2. mars | kl. 20.00: | Møti við Carl-Gustaf Severin (SE) |
| Leygardagur | 3. mars | kl. 20.00: | AWAKE við Carl-Gustaf Severin (SE) |
| Sunnudagur | 4. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Carl-Gustaf Severin (SE)<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum<br>Barnamøti |
| | | kl. 18.00: | Møti við Carl-Gustaf Severin (SE) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 5. mars. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 6 mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 8. mars | kl. 10.30-13.00: | Mammucafé |
| | | kl. 19.00: | kvinnuhugni |
| Fríggjadagur | 9. mars | kl. 20.00: | Konsert við Hillsong London |
| Leygardagur | 10. mars | kl. 20.00: | AWAKE við Búgva Olsen |
| Sunnudagur | 11. mars | kl. 11.00: | Familjumøti |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 12. mars | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 13. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| | | kl. 19.00: | Junior |
| Leygardagur | 17. mars | kl. 20.00: | AWAKE við ymiskari luttøku |
| Sunnudagur | 18. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 19. mars | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 20. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 22. mars | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 24. mars | kl. 20.00: | AWAKE við Anniku Høj (í lítla sali) |
| Sunnudagur | 25. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Wilson Goeda (S. Afrika)<br>Breyðbróting |

# Lýsingar

**Kvinnuhugni 8. mars**
Hósdagin 8. mars er altjóða kvinnudagur, og eins og undanfarnu ár, fara vit at hava eitt tiltak í Kelduni fyri allar kvinnur. Nógv gott og áhugavert verður á skránni. M.a. fara vit at hoyra eitt gott orð frá Birgit Frederiksberg, Jóhanna á Tjaldrafløtti kemur at geva góð ráð viðvíkjandi mati og matgerð, og møguleiki verður at keypa AloeVera og aðrar vørur úr Ísrael. Og so verður sjálvandi pláss til hugna og góða samveru. Eitt gott høvi at bjóða vinkonum, bindiklubbum o.s.fr. við til eitt hugnaligt kvøld saman :)

**Hillsong London í Kelduni**
Konsert við Hillsong London verður í Kelduni fríggjakvøldið 9. mars kl. 20.00.
Kostnaðurin er 169 kr. Atgongumerki kunnu keypast á keldan.fo.

**Vikuskiftismøtir við Carl-Gustaf Severin (SE)**
2.-4. mars verða vikuskiftismøtir við Carl-Gustaf Severin í Kelduni. Carl-Gustaf hevur verið í Kelduni tvær ferðir áður í samband við páskastevnur, seinast í 2013. Carl-Gustaf er ein trúar-predikantur, sum hevur prædikað í stórum pørtum av heiminum og upplivað nógvar grøðingar og nógvar sterkar vitnisburðar. Tey, sum hava hoyrt Carl-Gustaf, kenna eisini til hansara serligu evnir at greiða frá hendingum í hansara lívi uppá ein livandi og skemtligan hátt. Hetta vikuskiftið er eisini eitt gott høvi at bjóða onkrum við á møti sum vanliga ikki kemur til møtir. Við á ferðini er kona hansara Monika. Sí møtitíðirnar í skránni í hesum blaði.




Keldan

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584